MTHøjgaard We know how

J&K PETERSEN

EIÐI 2 Suður KONSORTIET

**Hevur tú hug at verða við til at gera tunnil við tí einastu tunnilsborimaskinuni í Føroyum?**




Eiði 2 Suður konsortiet er í gongd við at bora 8,5 km tunnil í.s.v. vatnorkuútbyggingina hjá SEV. Tað verður borað i 3-hold skiftum, við einum holdi á frívakt. Løn sambært sáttmála + boribonus.

EIÐI 2 Suður KONSORTIET

Torben Johansen
Tel: 216340
@: tjo@mth.dk



# Manning til Athenu og Poseidon

Til frystitrolarar okkara Athenu og Poseidon, tørvar okkum fólk til brúnna, galluna, maskinuna og dekkið/fabrikkina.

Og tá tú so hevur funnið útav at hettar er akkurát nakað fyri teg, so fert tú inn á heimasíðuna hjá thor: www.thor.fo – klikkir á knøttin “umsóknir til Athena” og fyllir umsóknina út.

**www.thor.fo**

FO-420 Hósvík · Faroe Islands · Tel 422 503
Fax 422383 · thor@thor.fo · www.thor.fo

THOR

*P/F THOR, er eitt felag sum eigur og rekur skip í oljuvinnuni, fiskivinnuni, og annað virksemi í hesum sambandi, víst verður til heimasíðu okkara www.thor.fo*

# Leiðari til Býarbókasavnið

www.torshavn.fo

**Søkt verður eftir býarbókavørði í Tórshavnar kommunu**

Býarbókasavnið hevur ein týðandi leiklut í gerandisdegnum hjá fólki í býnum, ungum sum eldri. Sum mentanar- og kunningardepil í miðbýnum og við tænastum um talgildu miðlarnar skal Býarbókasavnið áhaldandi mennast og verða ein fjøltáttaður, nýskapandi, sjónligur og virkin stovnur, ið røkkur út um vanliga bókasavnsvirksemið.

Býarbókasavnið varð stovnað 1. apríl 1969. Bókasavnið hevur tríggjar deildir, barnabókasavn, útlán fyri vaksin og lesistovu. Á bókasavninum eru 14 starvsfólk.

Hølini hjá býarbókasavninum eru víðkað og broytt, soleiðis at ein partur av bókasavninum nú er í veghæddini við kaféumhvørvi, sjálvgreiðslu, teldum v.m.

Meira fæst at vita um Býarbókasavnið á heimasíðuni www.bbs.fo.

**Kommunan bjóðar**
eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**

- at leiða og hava ábyrgd av dagliga virkseminum á býarbókasavninum
- at tryggja eitt tíðarhóskandi, mennandi og dygdargott umhvørvi
- at tryggja, at býarbókasavnið støðugt mennir og skapar nýggjar tænastur og nýtt virksemi samsvarandi tørvi ella møguleikum
- at tryggja, at bókasavnið hevur fullgóða fíggjarstýring og fremur úrslit
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**Førleikakrøv**

- Bókavarðarútbúgving frá viðurkendum norðurlendskum bókasavnsskúla ella akademiska bókavarðarútbúgving frá lærdum háskúla
- Royndir í bókasavnsarbeiði
- Royndir í leiðslu og samstarvi
- Góður teldukunnleiki og áhugi fyri kunningartøkni

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi, dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið á bókasavninum og kunna ganga á odda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. mai 2010 kl. 12.

**Meira fæst at vita**
Les meira um starvið og útgreinaðan starvsprofil á starvstorginum á www.torshavn.fo. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóra, á telf. 302010.

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER HØVUÐSSTAÐARKOMMUNA.** Í kommununi starvast tilsamans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava ein nútímans leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskifti og samskifti við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA